## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Hvassur vindur ella skrið av útnyrðingi og ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og stundum regn. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, mánadagin minni vindur. Sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 4 og 8 stig.

# Musikkur frá Musikki á Platformi



*Menninir aftan fyri Musikk eru Mikkel Torsting og Jesper Grenn. Teir eru báðir garvaðir plátuvendarar*

**Leygarkvøldið fer danski bólkurin, Musikk, at spæla til dans á Platform í Havn,**

DANSUR

Leygarkvøldið verður »musikkur« at hoyra á Platform í Havn, tí tá spælir danski bólkurin, Musikk til dans. Hetta er fyrstu ferð, teir vitja í Føroyum.

– Seinasta árið hevur tónleikur teirra verið meira at hoyra á Platform enn eitt nú Kylie Minogur, Westlife, Enrique Iglesias & Atomic Kitten, bara fyri at nevna nøkur, sigur Havgrímur Johannesen, stjóri á Platform.

Menninir aftan fyri Musikk eru Mikkel Torsting og Jesper Grenn. Teir eru báðir garvaðir plátuvendarar. Teir hava fyrr givið út stakfløgurnar Here comes the Musikk og Feel So Good, sum báðar kláraðu segvæl á danska dancechart.dk.

Havgrímur sigur, at teir báðir í Musikk eisini hava lovað at verið DJ á Platform fríggjakvøldið, og í tí sambandinum verður ókeypis atgongd.

Nøkur hitt hjá Musikk eru: Soul Limbo, You Can Cll Me Al & Jeg Vil La' Lyset Brænde...

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷4 |
| Nuuk | ÷1 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | ÷2 |
| Saint John's | 6 |
| Halifax | 6 |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 15 |
| Tromsø | ÷1 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | ÷3 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 11 |
| Warzawa | 13 |
| Kiev | 10 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 23 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 9 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | – |
| Sydney | 29 |
| New York | 11 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 28 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 21 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 969 hPa eystan fyri Skotland fer spakuliga norðureftir og dýpist nakað. Eitt hátrýst, 1030 hPa yvir Grønlandi viknar.




Djúpa lágtrýstið eystan fyri Føroyar fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 22/10 kl. 06⁰⁰– 23/10 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,9°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 4,0 mm – mált frá 22/10 kl. 06⁰⁰– 23/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 43,9 mm










## VESTFALLSKYRRINDI

20. okt.: Mánin longst frá jørðini
21. okt.: Fullmáni
29. okt.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 24. okt. | 09.19 | 21.40 | 08.19 | 20.40 | 08.34 | 20.55 | 11.19 | 23.40 | — | 12.19 | 07.34 | 19.55 | 06.34 | 18.55 | 09.34 | 21.55 | 10.34 | 22.55 | 09.04 | 21.25 | 10.19 | 22.40 |
| 25. okt. | 10.02 | 22.24 | 09.02 | 21.24 | 09.17 | 21.39 | — | 12.02 | 00.40 | 13.02 | 08.17 | 20.39 | 07.17 | 19.39 | 10.17 | 22.39 | 11.17 | 23.39 | 09.47 | 22.09 | 11.02 | 23.24 |
| 26. okt. | 10.47 | 23.11 | 09.47 | 22.11 | 10.02 | 22.26 | 00.24 | 12.47 | 01.24 | 13.47 | 09.02 | 21.26 | 08.02 | 20.26 | 11.02 | 23.26 | — | 12.02 | 10.32 | 22.56 | 11.47 | — |
| 27. okt. | 10.36 | 23.01 | 09.36 | 22.01 | 09.51 | 22.16 | 01.11 | 12.36 | 02.11 | 13.36 | 08.51 | 21.16 | 07.51 | 20.16 | 10.51 | 23.16 | 00.26 11.51 | — | 10.21 | 22.46 | 00.11 11.36 | — |
| 27. okt. | – vetrartíð | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |

5 707265 100043 >